# BINGO í Ballerup

Tá heimsins virknasta føroyingafelag skipar fyri BINGO, savnast ættarliðini fyri at hugna sær saman. Sosialurin var við á BINGO við útisetunum í Ballerup



*Hugnaligu sethúsini á Ryttergården vóru á tremur við føroyingum fyrsta sunnudag í advent.*

**ÚTISETALÍV**
*Orð: Niels Uni Dam*
*sosialurin.fo*
*Myndir: Símun Jóannesarson*

Fyrsta sunnudag í advent er sum vant føroyskt BINGO á Ryttergården í Ballerup, eini 80-90 fólk eru savnaði í sethúsinum á Ryttergården. Hetta er hvørki meira ella minnið enn, tað plaga at vera. Hølini eru hugnalig, og fólk eru glað. Men sum til bingo flest er eitt sindur av spenningi í luftini. Vinningarnir eru ymiskt, sum limirnir hava latið ella sum felagið hevur keypt. Eingin ivi er tó um, hvør høvuðsvinningurin, ein ferð fyri tvey við bili til Føroyar við Norrønu er hægst á listanum hjá flestu bingogestunum. Hóast onkur av teimum yngru heldur, at tann stóri legokassin, sær nógv meira áhugaverdur út.

**Heimsins virknasta føroyingafelag**

Føroyingafelagið í Ballerup man teljast ímillum tey virknastu føroyingafeløgini í heiminum. Elinborg Joensen er forkvinna í felagnum, hon greiðir frá, at tey hava skipað fyri BINGO fyrsta sunnudag í advent síðan felagið var stovnað í 1968

Síðan í 1978 hevur hugnaligi Ryttergården verið karmur um virksemið hjá felagnum, og sostatt eisini árliga BINGO'ið. Gamli bóndagarðurin liggur eitt sindur fyri seg sjálvan, men tað tekur einans eitt korter at ganga frá Ballerup tokstøðini til garðin.

Fólkið, ið er savnað í hugnaligu sethúsunum henda dagin, er sum vant mest fólk úr Ballerup, Herlev, Smørum og Glostrup. Hetta eru fólk úr forstøðunum. Elinborg sigur, at onkur innið úr Keypmannahavn onkuntíð kemur til tiltøk, men tað er ikki so ofta. Tað eru oftast limirnir í felagnum, sum koma til tiltøkini. Felagið hevur uml. 130 limir.

**Savnar ættarliðini**

Bingoið er eitt serligt tiltak, og til tað koma ofta tey yngru ættarliðini við. Soleiðis er eisini henda sunnudagin. Har er tildømis Familjan Nolsøe/Stenberg, sum er umboðað við trimum ættarliðum. Hjá nógvum familjum, er hetta blivið siður hvønn fyrsta sunnudag í advent, og hetta er vorðið okkurt man ger saman sum familja.

Miðalaldurin hjá limunum í felagnum er støðugt hækkaður, og Elinborg fortelur at nógv eru farin gjøgnum árini, men fleiri hanga enn við. Hon gleðist um, at nú koma ommu- og abbabørn eisini við.



*Hugnaligu Bóndahúsini Ryttergården hava verið karmur um føroyska felagslívið í Ballerup síðan í 1978.*

**Nógv tiltøk**

Elinborg var eisini forkvinna, tá felagið varð stovað í 1968 og hevur verið virkin í felagnum øll árini. Nú er hon so vorðin forkvinna aftur. Hon sigur, at felagið er eitt sindur minnið virkið nú enn tað var fyrr, tá fólk vóru yngri. Men enn verður skipað fyri hugnakvøldið eina ferð um mánaðan, annað hvønn mánað er fyrilestur um okkurt evni, Trettandi verður altíð hildin tað fríggjakvøldið, ið er næst 6. januar, síðsta vikuskiftið í januar er ræskjøtaveitslan, umframt at felagið hevur várveitslu og heystveitslu.

Tá ræstkjøtaveitsla er verður eitt størri høli á Ryttergården, ið tey kalla Loen, tikið í nýtslu. Her rúmast fleiri fólk, og ræstkjøtaveitslan er altíð væl vitjað, sigur Elinborg. Fyrr plagdi føroyingafelagið at hava fullan nýtslurætt til Loen, men nú skulu tey gjalda leigu fyri hetta hølið, tí verður tað ikki brúkt so oftað sum fyrr.

Í sethúsinum rúmast umleið 100 fólk, so tey 80, sum eru



*BINGO er ein stuttligur máti at læra føroysku tølini.*